## Farvæl kustur - føstulávint sum bara á Sandi

Føstulávintshaldið heima á Sandi er tiltikið, og ikki bara her um leiðir. Blíðskapurin á Sandi stendur ikki aftan fyri nakran, og á føstulávint er hann framúr. Í ár hevur Ungmannafelagið Virkið valt at læta tiltiknað føstulávintsskemtið í ein altjóða ham, har skemtið eisini røkkur onnur, enn bara okkum lokalu.

Skemtileikir um Listasavnið og seyðasýning, ganga nú í parlag við Bonnie Tyler og sjálvan Elvis Presley. Eiggiligu bygdasprundini syngja sangir um Pisakanning og 266b. Eins og vit eru til vakurleikaviðgerð í Klaksvík, støkka inn gólvið hjá Pól Jákupi á Skarvanesi, og í sambadansi í Rio.

Á serliga hugnakvøldinum, leygarkvøldið 17. februar kl. 21.00, er helvtin av Pipar og Salt, Jákup Veyhe, føstulávintsgekkur. Kalda borðið skal tú teknað teg til tí avmarkað er hvussu nóg sleppa til borðið. Eftir borðhaldið kl.24.00, spæla Brak við Signari í Homrum og øðrum góðum kreftum til dans. Kl 01.00 fáa vit eisini vitjan av okkara Bonnie og Elvis.

Føstulávintsmánadagur er føstulávintsmánadagur, ið hvussu er á Sandi. Ungmannafelagshúsið er brynjað við barnatiltøkum, frá tunnusláing til grýlumáling. Børnini sláa tunnu kl. 13.00 og tey vaksnu kl. 15.00. Aftaná verður sjálvandi húsagongd og grýludansur, har prýðiligasta grýlan fær virðisløn.

Tvíkiljan Hydro Cat:

# Ein væl egnaður alibátur

**- Ofta hevur alivinnan heldur satsað upp á at umbygt fiskifør til alibátar, men eg eri onga løtu í iva um, at hetta er tann rætti alibáturin, sigur Marnar Dam, rakstrarleiðari á alibrúkinum hjá Pan Fish í Oyndarfirði**



*- Vit eru stak væl nøgdir við tvíkiljuna. Hetta er ikki tað sama. Báturin er væl útgjørdur til okkara arbeiði, og plássið á dekkinum er sera gott. Vit kunnu saktans hava tvær, tríggjar ella fýra fortoyningar á dekkinum í senn, sigur Marnar Dam, rakstrarleiðari hjá Pan Fish í Oyndarfirði Myndir: Sofus Gregersen*

HYDRO CAT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið nýggi alibáturin hjá Pan Fish í Føroyum fyri fyrstu ferð kom til Oyndarfjarðar seinasta hósdag, varð skipað fyri hugnaløtu við smyrjibreyði og øðrum í hølunum hjá felagnum í Oyndarfirði.

Tað er KJ-Hydraulik, sum hevur teknað bátin, ið er ein tvíkilja. Sjálvur skrokkurin er smíðaður uttanlands, men er bygdur liðugur, meðan hann hevur staðið í leigaðum hølum á Borðoyarvík.

Herfyri varð tvíkiljan sjósett og sigld til Fuglafjarðar, har KJ hevur lagt seinastu hond á verkið.

### Yngsta dóttirin

Seinnapartin hósdagin stevndi báturin so norður um Ennið og helt leiðina til Oyndarfjarðar, har Pan Fish í Føroyum skal brúka hann í alivinnuni.

Á samkomuni í Oyndarfirði hendan dagin vóru eitt nú umboð fyri Pan Fish og stjórin í KJ-Hydraulik, Ólavur A. Olsen.

Rakstrarleiðari hjá Pan Fish í Oyndarfirði er Marnar Dam, sum eisini býr í Oyndarfirði. Hann og konan, Leila, eiga eina 4 ára gamla dóttir, sum eitur Jónleyg, og nýggja tvíkiljan er uppkallað eftir henni.

Í gjár ringdu vit til Marnar Dam og fregnaðust, hvussu teir eru nøgdir við tvíkiljuna, sum samstundis er fyrsti báturin, ið Pan Fish hevur latið KJ byggja.

### Sera arbeiðsligur

- Jú, vit eru stak væl nøgdir. Hetta er ikki tað sama. Tvíkiljan er væl útgjørd til okkara arbeiði, og plássið á dekkinum er sera gott.

Marnar vísir á, at alivinnan ofta hevur ”satsað” upp á at umbygt fiskifør til alibátar.

- Men eg eri onga løtu í iva um, at hetta er hin rætti alibáturin.

Tá ið Sosialurin hevði Marnar Dam í telefonini, vóru teir júst í holt við at taka fortoyningar upp á Oyndarfirði.

- Tað er soleiðis, at tá ið slíkar fortoyningar hava ligið úti eini 5-6 ár, er tíðin komin til at taka tær upp og skifta tóverkið út, áðrenn fortoyningarnar verða lagdar útaftur.

Hann sigur, at nú teir hava fingið nýggjan og rúmligan bát, gongur hetta arbeiði bæði skjótt og væl.

- Vit kunnu saktans hava einar tvær, tríggjar ella fýra fortoyningar á dekkinum í senn, og tað hevði ikki verið møguligt, um dekkið ikki var so rúmligt. Jú, hetta er nakað av tí, heldur Marnar fyri.

### Lidnir at taka

Í løtuni hevur Pan Fish ongan fisk úti á Oyndarfirði.

- Vit vóru lidnir at taka í november, og nú liggur økið stilt, til vit fara at seta smolt útaftur seinni í vár, sigur Marnar Dam, rakstrarleiðari í Oyndarfirði.

